

# Eir í Ólavsstovu

*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
- Eg fari at halda jól hjá mammu á Heiðavegi 14 - í ár eins eins og vit plaga. Allar systrarnar við familju halda jól saman við mammu.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
- Dunnu og gás, Fyrr plagdu vit at eta rastan fisk og speril, men børnini hjá okkum hava sagt kortanei, tey vilja hava gás og dunnu.

Hvat er tað besta við jólum?
- At hava fríð og at vera saman við familjuni og hugna mær.

Hvat er minni gott við jólum?
- Ov nógv át. Eg noyðist altíð á sleinkikur aftaná jól.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
- Ja í fleiri ár, tá eg búði í Danmark, men tað var sjálvandi ikki uttanlands, tí tá var tað heima... So nei, eg havi aldri hildið jól uttanlands, men eg kundi hugsa mær tað

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
- Puha, veit ikki, lurti ikki so nógv eftir jólatónleiki, men tað øll lurta eftir meti eg

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
- Eg ynski mær eina ferð til Grand Ganaria, eitt árskort frá Yndi, eina góða bók, undirklæðir, onkra góða perfume og nógv nógv annað.



















